

# Álit við tilmæli um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

2024

1 Inngangur 3
1.1 Arbeiðssetningur 3
1.2 Undanfarin álit og málsgongd 3
1.3 Innsavnan av upplýsingum og allýsingar 3
1.4 Bygnaðurin í álitinum 4

2 Samandráttur 5
2.1 Høvuðsatlit 5
2.2 Tilmæli 5
2.3 Avleiðingar av at seta tilmælini í verk 5

3 Verandi skipan í Føroyum 6
3.1 Landsstýrisfólk 6
3.2 Løgtingslimir 9

4 Skipanin í grannalondum okkara 13
4.1 Grønland 13
4.2 Ísland 14
4.3 Danmark 16
4.4 Noreg 18

5 Lønarlagið í føroyska samfelagnum 20
5.1 Samanbering - privata tænastuvinnan v.m. 20
5.2 Løgmansstjórin og aðalstjórar 21
5.3 Hægstu lønir í almenna geiranum 22

6 Viðgerð og tilmæli 23
6.1 Inngangur 23
6.2 Grundarlagið undir samsýning til løgmann og landsstýrisfólk 23
6.3 Lønarsamsýning til løgmann og landsstýrisfólk 23
6.4 Fríur bústaður, kostnaðarendurgjald og ferðing 25
6.5 Samskiftisútreiðslur 25
6.6 Fráfaringarløn 26
6.7 Eftirlønarviðurskifti 26

7 Keldulisti 27
7.1 Lógartilfar 27
7.2 Annað tilfar 27
7.3 Heimasíður 28

Fylgiskjøl 29

# 1 Inngangur

Løgmaður hevur, við heimild í løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2003 um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m., í skrivi, dagfest 10 mai. 2023 , tilnevnt Jórun Gardar, Janu Joensen og Kára Davidsen, í nevndina fyri hetta valskeiðið.

Nevndin skipaði seg á fyrsta fundi við Jórun Gardar sum forkvinnu.

## 1.1 Arbeiðssetningur

Nevndin skal geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m. sambært løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2003.

Endamálið við lógini er at tryggja løgmanni dygt og væl grundað tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m., og skal nevndin sambært lógini taka atlit til:

- lønarlagið í landinum yvirhøvur;
- teirri tign og ábyrgd, sum liggur í størvunum;
- hvussu samsvarandi størv í grannalondum okkara verða lønt, og
- onnur viðkomandi viðurskifti.

Tilmælið skal verða handað í seinasta lagi við endan á aðru tingsetu í einum valskeiði. Tað vil í hesum føri siga í seinasta lagi áðrenn ólavsøku 2024.

## 1.2 Undanfarin álit og málsgongd

Hetta álit er tað sætta álitið við tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m.

Álitini hjá báðum fyrstu nevndunum, tað fyrra latið 14. juni 2005 og hitt seinna tann 27. juli 2009, vóru drúgv álit við neyvari lýsing av økinum og tilmælum um broytingar í lógini. Tó hevur hvørki av hesum báðum álitum fingið nakra ítøkiliga politiska viðgerð.

Triðja nevndin handaði sítt álit tann 3. januar 2013. Hetta álitið varð viðgjørt politiskt, og við støði í álitinum og viðgerðini varð semja um at gera broytingar í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

Táverandi løgmaður, Kaj Leo Holm Johannesen, legði uppskot til løgtingslóg fyri Løgtingið tann 28. februar 2014 sum løgtingsmál nr. 95/2013. Uppskotið varð lagt í serliga §25 nevnd, sum hevði fleiri fundir um málið. §25 nevndin legði fram álit tann 8. mai 2014. Við 3. viðgerð varð eitt broytingar-uppskot lagt fram og samtykt. Endaliga uppskotið til løgtingslóg varð samtykt við 19 atkvøðum fyri, 12 ímóti og 0 blonkum atkvøðum tann 9. mai 2014. Lógin varð lýst tann 19. mai 2014 at koma í gildi, tá ið nýtt landsstýrið hevði tikið við eftir fyrstkomandi løgtingsval. Knapt 9 ár eru sostatt liðin, síðan verandi lóg kom í gildi á heysti 2015.

Tey bæði seinastu álitini – frá 2017 og 2021 – mæltu bæði til at verandi skipan skuldi halda fram á flestu økjum.

## 1.3 Innsavnan av upplýsingum og allýsingar

Núsitandi nevnd hevur valt at leggja dent á hesi evni í sínum áliti:

- At lýsa galdandi lóg, herundir hvørjar broytingar vórðu gjørdar í lógini í 2014;
- at kanna, hvussu broytingarnar eru settar í verk, og hvussu tær virka;
- at dagføra brotini í undanfarnu álitunum um skipanina í Føroyum, samanborið við grannalond okkara og
- at meta um, hvørt tað er tørvur á broytingum í galdandi lóg.

Nevndin hevur m.a. samskift við Løgmansskrivstovuna, herundir Sendistovu Føroya í Íslandi, Sendistovu Føroya í Danmark, Fíggjarmálaráðið, Løgtingsskrivstovuna, Hagstovuna og Inatsisartut skrivstovuna til greining av ávísum spurningum.

Lógin nevnir bert samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. Løgmaður verður ikki nevndur serstakt í yvirskriftini til lógina. Eins og undanfarna nevnd hevur henda nevndin valt at nevna løgmann serstakt, tá ið tað eru hansara serligu viðurskifti, sum verða umrødd; annars verður brúkt heitið landsstýrisfólk. Fyri londini Noreg, Danmark og Ísland eru vald felagsheitini stjórnarleiðarar og ráðharrar. Fyri Grønland hava vit valt at nýta teirra egnu heiti, umskrivað til føroyskt.

## 1.4 Bygnaðurin í álitinum

Í parti 2 verða nevnd tey høvuðsatlit, sum nevndin hevur lagt dent á í sínum arbeiði, og síðani verður tikið samanum tilmælini. Somuleiðis verður heilt stutt nomið við avleiðingarnar av at seta tilmælini í verk.

Í parti 3 lýsir nevndin verandi samsýningarskipan v.m. fyri løgmann og landsstýrisfólk, sundurgreinað í lønarsamsýning, frían bústað og kostnaðarendurgjald, samskiftisútreiðslur, fráfaringarløn, við deyða, eftirlønarviðurskifti og aðrar starvsreglur. Í parti 3.2 verður skipanin hjá løgtingslimum umrødd.

Í parti 4 verða skipanir í grannalondunum Grønlandi, Íslandi, Danmark og Noregi lýstar.

Í parti 5 lýsa vit lønarlagið í Føroyum fyri samanberilig størv.

Í parti 6 verða tey einstøku liðini í verandi samsýningarskipan viðgjørd. Tikið verður samanum skipanina í dag og komið verður við tilmælum um, hvussu samsýningarskipanin eftir nevndarinnar tykki í framtíðini eigur at verða sett saman.

Tórshavn, 19. juli 2024

Jórun Gardar      Jana Joensen      Kári Davidsen

# 2 Samandráttur

## 2.1 Høvuðsatlit

Nevndin hevur í arbeiði sínum lagt dent á at koma við einum áliti, sum lýsir galdandi skipan við teimum tillagingum, sum hava verið gjørdar, síðani seinasta álitið varð latið løgmanni.

Nevndin hevur dagført upplýsingarnar frá undanfarnu álitunum um skipanirnar í grannalondunum, sum samanborið verður við.

Tað eru knapt 9 ár liðin, síðani skipanin varð broytt munandi eftir tilmæli frá nevndini sum gjørdi álitið í 2012. Nevndin metir, at skipanin sum heild er munandi betri, rímiligari og meiri gjøgnumskygd enn hon var, áðrenn broytingarnar, men nevndin hevur tó okkurt broytingartilmæli, ið rør aftur á upprunaliga tilmæli frá 2012-álitinum, sum ikki kom í galdandi lóg.

## 2.2 Tilmæli

Samanumtikið gevur nevndin løgmanni hesi tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m.:

Mælt verður til, at verandi skipan heldur fram á flestu økjum:

- Lønartalvan hjá tænastumonnum landsins eigur framvegis at nýtast sum grundarlag undir lønarsamsýningini til løgmann og landsstýrisfólk (6.2.);
- lønarlagið verður mett at verða hóskandi og eigur tí fyribils ikki at verða broytt (6.3.); og
- eftirlønarskipanin verður mett at verða greið og skynsom og eigur tí at halda áfram (6.7).

Mælt verður til hesar broytingar:

- Løgmaður og landsstýrisfólk skulu hava ráðharrabil tøkan eftir teimum reglum, sum lagt varð upp til í uppruna uppskotinum til lógarbroytingina í 2015 (6.4.);
- øll lønarinntøka skal verða mótroknað í fráfaringarløn, um so er, at fráfaringarløn verður latin fyri eitt tíðarskeið, sum er longri enn 3 mánaðir (6.6).

## 2.3 Avleiðingar av at seta tilmælini í verk

Verða tilmælini fylgd, mugu neyðugar tillagingar gerast í viðkomandi lóggávu.

Um løgmaður og landsstýrisfólk skulu hava ráðharrabil, krevur hetta eina broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., sum seinast broytt við kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015.

Ein møgulig broyting av ásetingini um at mótrokna alla almenna inntøku í fráfaringarlønini krevur eina broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., sum seinast broytt við kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015.

# 3 Verandi skipan í Føroyum

## 3.1 Landsstýrisfólk

Samsýning og eftirløn landsstýrismanna er í dag skipað sambært løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993, sum seinast broytt við kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015.

Fleiri broytingar vórðu gjørdar á økinum í 2014 eftir tilmæli frá undanfarnu nevndini, sum lat inn álit Gamlaárskvøld 2012.

Niðanfyri hava vit lýst mest týðandi liðini í lógini hvør sær. Har broytingar vórðu gjørdar í 2014, verður hetta lýst og viðmerkt.

### 3.1.1 Lønarsamsýning

Eftir galdandi lóg fær løgmaður eina mánaðarliga samsýning, sum er 130% av 40. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins. Landsstýrisfólk fáa eina mánaðarliga samsýning, sum er 110% av 40. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins. Sambært lønartalvu hjá tænastumonnum landsins galdandi frá 1. oktober 2023 til 30. september 2024, svarar 40. lønarflokkur til eina mánaðarløn á 74.682,27 kr.

| Lønarsamsýning, kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---|---|
| Løgmaður | 97.087 | 1.165.044 |
| Landsstýrisfólk | 82.150 | 985.800 |

Samsýningin verður útgoldin mánaðarliga frammanundan frá 1. degi í mánaðinum aftaná, at landsstýrisfólkið hevur tikið við starvinum til tann mánaðurin er úti, tá ið landsstýrisfólkið fer frá.

Áðrenn lógarbroytingina í 2015 fekk løgmaður eina mánaðarliga samsýning samsvarandi 40. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, meðan landsstýrisfólk fingu samsýning samsvarandi 38. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins.

Harafturat fingu løgmaður og landsstýrisfólk, umframt lønarsamsýningina, útgoldið skattafrítt borðfæ. Løgmaður fekk í 2012 útgoldið umleið 85.000 kr. sum borðfæ um árið, meðan landsstýrisfólk sama ár fingu útgoldið umleið 28.000 kr. hvør sum borðfæ um árið. Hetta er nú strikað.

### 3.1.2 Fríur bústaður og kostnaðarendurgjald

Hevur løgmaður fastan bústað uttanfyri høvuðsstaðarøkið[1], kann hann flyta til høvuðsstaðin í ein bústað, sum landið rindar.

Viðvíkjandi landsstýrismonnunum, so kann løgmaður játta landsstýrisfólkum endurgjald fyri útreiðslur til bústað í høvuðsstaðnum, um viðkomandi í starvstíðini hevur fastan bústað, har tað

[1]Tað vil siga uttanfyri Tórshavn, Hoyvík, Argir og Hvítanes.

ikki er landfast, ella serlig viðurskifti gera seg galdandi. Fyri hvørt landsstýrisfólk verður í mesta lagi endurgoldið, móti kvittan, upp til 10.000 kr. pr. mánað fyri húsaleigu, el og hita.[2]

Í løtuni fær eitt landsstýrisfólk endurgjald fyri útreiðslur til bústað í høvuðsstaðnum sambært omanfyri nevndu reglum.

Sambært §1, stk. 4, í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna, so fáa løgmaður og landsstýrisfólk, sum ikki eru úr Tórshavn, Hoyvík, Argjum ella Hvítanesi, árligt kostnaðarendurgjald afturat lønini, grundað á reglurnar um endurgjald til tænastu- og starvsmenn.

Kostnaðarendurgjaldið verður latið soleiðis:

a) Flutningskostnaður við egnum bili við Strandfaraskipum Landsins 200 ferðir aftur og fram árliga.
b) Koyripeningur og tunnilsgjald millum heimstað og Tórshavn 200 ferðir aftur og fram árliga.

Kostnaðarendurgjaldið er skattskyldugt og verður útgoldið mánaðarliga afturút við 1/12 av árligu upphæddini.

Tvey landsstýrisfólk fáa kostnaðarendurgjald í løtuni. Hini landsstýrisfólkini búgva í Tórshavn og fáa tí einki kostnaðarendurgjald.

### 3.1.3 Ferðaútreiðslur

Landsstýrisfólk fáa ferðastuðul sambært løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 1997 um stuðul til ferðaútreiðslur. Ferðastuðulin, sum ikki er skattskyldugur, verður mótroknaður í kostnaðarendurgjaldinum.

Nærri reglur um ferðing hjá landsstýrisfólkum í embætisørindum eru ásettar í kunngerð nr. 120 frá 21. juli 2021 um ferðing í embætisørindum og um samskiftisútreiðslur hjá landsstýrismonnum. Sambært § 2, stk. 1, í kunngerðini skulu embætisferðir innanlands og uttanlands hjá landsstýrismonnum fara fram eftir somu reglum sum galda fyri tænastumenn landsins. Tó ber til, sambært § 2, stk. 2, at víkja frá ásetingunum í stk. 1, við atliti at tignini í landsstýrismannembætinum, og vegna tær umstøður sum eru øðrvísi hjá landsstýrismonnum enn tænastumonnum.

### 3.1.4 Samskiftisútreiðslur

Sambært kunngerð § 3 í nr. 120 frá 21. juli 2021 um ferðing í embætisørindum og um samskiftisútreiðslur hjá landsstýrismonnum, so veitir landið landsstýrismonnum neyðuga telduútgerð o.a. at nýta á arbeiðsstaðnum. Harumframt veitir landið fartelefon, telduútgerð o.a. at nýta við hús í embætinum og rindar landið í hesum sambandi fyri nýtslu av fartelefon og interneti.

### 3.1.5 Fráfaringarløn

Tá landsstýrisfólk fer frá, fær viðkomandi samsýning eftir hesi reglu:

[2] Sambært §8 í lógini um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. verður endurgjaldið fyri húsaleigu, el og hita javnað sbrt. §2 í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum við seinni broytingum.

- Sitið 0 -1 ár: 3 mánaðir
- Yvir 1 ár: 6 mánaðir

Fráfaringarlønin er tann sama sum lønarsamsýningin.

Fær landsstýrisfólk í fráfaringartíðarskeiðnum samsýning ella bíðipening sum løgtingsfólk, verður henda inntøkan mótroknað í fráfaringarlønini. Onnur inntøka verður ikki mótróknað í fráfaringarlønini.

### 3.1.6 Við deyða

Doyr landsstýrisfólk, meðan viðkomandi er í starvi, fær eftirsitandi hjúnafelagi ella børn undir 18 ár samsýning í 6 mánaðir.

### 3.1.7 Eftirlønarviðurskifti

Áðrenn lógarbroytingina í 2014 høvdu landsstýrisfólk rætt til egineftirløn, tá ið viðkomandi hevði verið landsstýrisfólk í minsta lagi eitt ár samanlagt.

Hægsta eftirlønin hjá hesum landsstýrisfólkunum er 60% av eftirlønargevandi lønini í tí lønarflokki, sum landsstýrisfólkið varð samsýnt eftir, tá ið viðkomandi fór úr starvi. Rætturin til fulla eftirløn varð vunnin eftir 8 ára starvstíð. Rætturin til eftirløn varð vunnin soleiðis:

| Egineftirløn | Uppsparing |
|---|---|
| 1. til 4. árið | 9% árliga |
| 5. til 8. árið | 6% árliga |
| Tilsamans eftir 8 árum | 60% |

Eftirlønin hjá hesum landsstýrisfólkunum verður útgoldin mánaðarliga frammanundan frá 1. í mánaðinum aftaná, at viðkomandi hevur fylt 67 ár. Hevur viðkomandi bæði verið løgmaður og landsstýrisfólk, fær viðkomandi eftirløn sum løgmaður.

Reglur eru ásettar í tágaldandi lóg um, hvussu gerast skal, tá ið landsstýrisfólk eisini hava sitið á løgtingi, hvussu niðursett eftirløn verður útroknað og fyri hjúnafelagaeftirløn og barnaeftirløn.

Aftaná lógarbroytingina í 2015 rindar landið upp til 15% av lønarsamsýningini, sum løgmaður og landsstýrisfólk fáa, afturat í eftirløn í eina eftirlønarskipan, sum er góðkend av landsstýrinum.

Eftirlønarprosentið verður ásett í mun til, hvussu leingi landsstýrisfólkið hevur verið landsstýrisfólk eftir gomlu skipanini og í mun til, hvussu leingi landsstýrisfólkið hevur sitið á tingi.[3]

### 3.1.8 Aðrar starvsreglur

Sambært §9 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna er ásett, at um landsstýrisfólk, tá ið viðkomandi tekur við, hevur størv í almennari tænastu ella privatum virkjum, samtøkum ella stovnum, skal viðkomandi vanliga siga tey frá sær. Landsstýrisfólk kann tó í hendinga førum, við

[3] Sí fylgiskjal 1

samtykki løgmans, halda fram í tílíkum starvi, um løgmaður heldur, at tey ikki kunna hava við sær trupulleikar í røkjan av embætisskylduni sum landsstýrisfólk.

Løgmaður boðar løgtinginum frá, hvørji størv avvarðandi landsstýrisfólk framvegis hava loyvi at røkja, og hvørji størv løgmaður sjálvur framhaldandi ætlar at røkja.

Landsstýrisfólk hevur sambært §10, stk. 2, í lógini rætt til farloyvi í sambandi við barnsburð og ættleiðing eftir reglunum, sum er galdandi fyri tænastumenn.

## 3.2 Løgtingslimir

### 3.2.1 Lønarsamsýning

Løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna ásetir reglurnar fyri samsýning til løgtingslimir. Løgtingið hevur í 2024 samtykt nýggja lóg (løgtingslóg nr. 55 frá 29. mai 2024 um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk), sum kemur í gildi tá ið nýtt løgting verður sett eftir fyrst komandi løgtingsval.

Sambært §1 í hesi lóg verða løgtingslimir samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, meðan løgtingsformaðurin verður samsýntur eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri løgmann. Næstformonnum tingsins og nevndarformonnum verður afturat mánaðarlønini veitt serlig samsýning, sum er 30.000 kr. árliga.

Vanliga skattskylduga samsýningin til løgtingslimir kann samanfatast soleiðis:

| Lønarsamsýning, kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---|---|
| Løgtingsformaður | 97.087 | 1.165.044 |
| Næstformenn í tinginum | 48.874 | 586.488 |
| Løgtingslimir, sum eru nevndarformenn | 48.874 | 586.488 |
| Løgtingslimir | 46.374 | 556.488 |

### 3.2.2 Kostnaðarískoyti

Umframt føstu samsýningina, sum er nevnd omanfyri, fáa allir løgtingslimir eitt skattafrítt endurgjald upp á 2.000 kr. um mánaðin fyri útreiðslur, ið standast av arbeiðinum.

### 3.2.3 Kostnaðarendurgjald

Afturat lønarsamsýningini og kostnaðaríksoytinum verður veitt eitt árligt skattafrítt kostnaðarendurgjald, grundað á reglurnar um endurgjald til tænastu- og starvsmenn, til teir løgtingslimir, sum búgva uttanfyri høvuðsstaðarøkið[4]. Kostnaðarendurgjaldið er roknað út eftir, at løgtingslimir møta 100 dagar í Løgtinginum um árið.

Sambært §1, stk. 3, í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna fær løgtingslimur, sum er valdur í øðrum valdømi enn Suðurstreymoy, men býr ella kann haldast at hava fast tilhald í Tórshavnar kommunu, sum endurgjald fyri eykaútreiðslur í hesum sambandi, samsýning sum nevnt omanfyri svarandi til 50 ferðir árliga. Hetta verður roknað eftir miðaltalinum millum Tórshavn og

[4] Tað vil siga uttanfyri Tórshavn, Hoyvík, Argir og Hvítanes.

stytstu og longstu farleið til pláss í valdøminum, har hann er valdur. Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at teksturin í lógini ikki er rættaður, síðani Føroyar eru blivnar eitt valdømi. Heldur ikki eru broytingar gjørdar, síðan undirsjóvartunlarnir eru vorðin partur av føroyska infrakervinum.

Skipanin verður sambært Løgtingsskrivstovuni praktiserað soleiðis í dag, at tinglimur, sum býr uttanfyri Suðurstreymoy, men sum velur at flyta til Havnar, í sambandi við at hann verður valdur á løgting, fær endurgjald fyri eykaútreiðslur svarandi til 50 ferðir árliga.

Fyri hvønn tingdag, tinglimur ikki møtir á løgtingsfundi, verður sambært §1, stk. 7, í løgtingslóg um samsýning og eftir løgtingsmanna gjørdur frádráttur í kostnaðarendurgjaldinum.

Niðanfyri eru nøkur dømi um, hvat tinglimur, ið býr uttanfyri høvuðsstaðarøkið, og sum møtir á tingi 100 dagar í árinum, hevur rætt til í skattafríum kostnaðarendurgjaldi. Gevið gætur, at tølini eru uttan tunnilsgjøld.

| Árligt skattafrítt endurgjald, kr. | |
|---|---|
| Norðstreymoy (Vestmanna) | 40.600 |
| Eysturoy (Runavík) | 56.600 |
| Norðoyggjar (Klaksvík) | 63.000 |
| Vágar (Miðvágur) | 39.960 |
| Sandoy (Sandur) | 45.020 |
| Suðuroy (Tvøroyri) | 37.500 |

Samsýningarnar og kostnaðarendurgjaldið verða sambært §2, stk. 1, í lógini útgoldin við 1/12 mánaðarliga frammanundan frá 1. degi í mánaðinum, aftaná at Løgtingið hevur góðkent valbrævið hjá viðkomandi løgtingslimi, til endan á tí mánaði, løgtingslimur leggur tingsessin frá sær.

### 3.2.4 Ferðaútreiðslur

Í sambandi við ferðing uttanlands í løgtingsørindum verður, sambært §1, stk. 6, í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, veitt ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins.

### 3.2.5 Samskiftisútreiðslur

Løgtingslimir fáa útflýggjaðan hvør sína farteldu til løgtingsarbeiðið. Tey fáa ikki telefon frá Løgtinginum.

### 3.2.6 Fráfaringarløn

Verður løgtingslimur ikki afturvaldur, ella má hann leggja tingsessin frá sær vegna sjúku, fær hann, sambært §2, stk. 2, 1. pkt., í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, samsýning sambært §1, stk. 1, í somu lóg í 1 mánað fyri hvørt árið, hann hevur havt sess á løgtingi, tó í minsta lagi í 4 mánaðir og í mesta lagi í 6 mánaðir.

### 3.2.7 Við deyða

Doyr løgtingslimur, fáa hjúnafelagi ella børn undir 18 ár, sambært §2, stk. 2, 2. pkt., í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, samsýning eftir §1, stk. 1, í somu lóg í 6 mánaðir.

### 3.2.8 Eftirlønarviðurskifti

Løgtingslimur hevur sambært §4, stk. 1, í løgtingslóg um eftirløn og samsýning løgtingsmanna rætt til egineftirløn, tá ið hann hevur havt sæti á løgtingi í minsta lagi í 1 ár tilsamans. Eftirlønin verður útgoldin, tá ið tinglimurin fyllir 67 ár, um hann ikki framvegis hevur sæti á løgtingi. Í serligum føri kann løgtingslimur fáa eftirløn frá 60 ára aldri[5]. Hægsta egineftirlønin er 60% av eftirlønargevandi lønini í 34. lønarflokki, og verður henda veitt, tá ið løgtingslimur hevur havt sæti á tingi í 16 ár ella meir.

Ein løgtingslimur vinnur sær rætt til eftirløn soleiðis:

| Egineftirløn | Uppsparing |
|---|---|
| 1. til 8. árið | 4,5% árliga |
| 9. til 16. árið | 3% árliga |
| Tilsamans eftir 16 árum | 60% |

Hægsta eftirlønin hjá løgtingsformanninum, sum er 60% av eftirlønargevandi lønini í lønarflokkinum, hann er samsýntur í, verður veitt, tá ið løgtingsformaðurin hevur verið formaður í 8 ár ella meira.

Serligar reglur eru í lógini, sum viðgera støðuna, tá løgtingslimur hevur rætt til egineftirløn frá øðrum størvum.

Eisini eru ásettar reglur um eftirløn til eftirsitandi hjúnafelaga og børn eftir løgtingslim.

### 3.2.9 Aðrar starvsreglur

Sambært §3 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna hevur løgtingslimur, sum er í starvi hjá landinum, eini kommunu, kommunalum felagsskapi, landsfyritøku ella hjá einum konsessioneraðum felag, rætt til farloyvi úr starvi sínum í tíðarskeiðinum, meðan hann hevur sæti á tingi. Løgtingslimur, sum hevur starv hjá einum av omanfyri nevndu stovnum ella hjá ríkinum, kann í mesta lagi starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann/hon er løgtingslimur ella varafólk fyri løgtingslim.

Løgtingslimir hava, sambært §2, stk. 4, í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, rætt til farloyvi uttan frádrátt í samsýning og eftirlønaraldri í sambandi við barnsburð ella ættleiðing.

### 3.2.10 Nýtt álit

Ein arbeiðsbólkur handaði tann 16. februar 2024 løgtingsforkvinnuni eitt tilmæli um, hvussu tey halda, at lønar- og eftirlønarskipanin hjá tingfólkum eigur at síggja út í framtíðini.

Størstu broytingarnar eru í stuttum, at lønin hækkar úr 34. lønarflokki upp í 36. lønarflokk eftir tænastumannastiganum, men samstundis verður tænastumannaeftirlønin avtikin og løgd um til eina vanliga 15% eftirlønarskipan, eins og skattafría mánaðarliga kostnaðarískoytið á 2.000 kr. verður strikað.

[5] Sbrt. §4, stk. 2 í løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Tann 7. mars 2024 legði formansskapurin Í Løgtinginum eitt uppskot til nýggja lóg um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk fyri tingið.

Lógaruppskotið bygdi í stóran mun á álitið frá uttanhýsis lønarnevndini. Tilmælið um lønarhækking var tó ikki tikið við í lógaruppskotið. Størsta broytingin í mun til galdandi lóg er, at skotið verður upp, at fara frá verandi tænastumannaeftirløn við serstøkum treytum, til eina eftirløn, har tingfólk fáa upp til 15% í eftirløn. Ein skiftisskipan fyri verandi tingfólk ger, at eftirlønin verður millum 0% og 15% alt eftir starvstíðini og vunnum rætti eftir galdandi pensjónsskipan. Eftirlønaraldurin fer at fylgja fólkapensjónsaldrinum. Skotið verður eisini upp at bøta um treytirnar hjá varafólki, umframt aðrar broytingar, sum lønarnevndin mælti til.

Uppskotið varð samtykt 17. mai 2024 (løgtingslóg nr. 55 frá 29. mai 2024 um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk), og koma lógarbroytingarnar í gildi tá ið nýtt løgting verður sett eftir fyrst komandi løgtingsval.

# 4 Skipanin í grannalondum okkara

Nevndirnar, sum handaðu løgmanni álit undanfarin ár, hugdu at galdandi skipanunum í Grønlandi, Íslandi, Danmark og Noregi. Tað arbeiðið var væl úr hondum greitt, og vit hava valt at endurgeva tað her við teimum tillagingum, sum broytingar síðani 2021 hava ført við sær.

## 4.1 Grønland

Samsýningar v.m. til landstings- og landsstýrislimir eru ásettar í "Landstingslóg nr. 22 frá 18. desember 2003 um "Vederlag m.v. til medlemmer af Landstinget og Landsstyret m.v.", sum seinast er broytt við Inatsisartutlóg (landstingslóg) nr. 42 frá 23. november 2017.

### 4.1.1 Lønarsamsýning

Lønin hjá landstings- og landsstýrislimir er ásett í §1 og §6 í landstingslóg nr. 22 frá 18. desember 2003, har lýst er at bæði landstings- og landsstýrislimir fáa eina samsýning, sum er tengd at lønartalvuni fyri tænastumenn í Grønlandi (ASG–økið). Samsýningin til landsstýrisformannin og hini landsstýrisfólkini fylgir 38. lønarstigi. Samsýningin til landstingslimir fylgir 35. lønarstigi.

Umframt lønina fáa bæði landsstýris- og landstingslimir aðrar viðbøtur, sum verða javnaðar samsvarandi lønarbroytingunum á tænastumannaøkinum í Grønlandi.

Lønin hjá landsstýrislimum, sum eisini eru landstingslimir, verður goldin lutfalsliga av bæði landstingi og landsstýri.

Samsýningin til landsstýris- og landstingslimir í Grønlandi er frá 1. apríl 2022, sum er seinasta tøka lønartalva.

| Lønarsamsýning, kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---:|---:|
| Landsstýris- og landstingsformaðurin | 94.201 | 1.130.408 |
| Landsstýrislimir, sum eisini er landstingslimir | 78.819 | 945.832 |
| Landsstýrislimir, sum ikki eru landstingslimir | 72.544 | 870.524 |
| Landstingslimir | 38.152 | 457.827 |

### 4.1.2 Fríur bústaður og kostnaðarendurgjald

Sambært §6, stk. 6 fáa landsstýrislimirnir tænastubústað og skulu gjalda 60% av tí húsaleigu, sum verður roknað fyri bústaðin í samsvari við galdandi reglur fyri útrokning av húsaleigu fyri bústaðir, sum grønlendska heimastýrið ávísir sum tænastumannabústaðir.

Landsstýrislimir fáa onki fast kostnaðarendurgjald, men hava rætt til at halda útreiðslur til umboðan og til tænastuferðir fyri landskassans rokning. Harumframt er serstøk skipan galdandi fyri fríferðir til Nuuk hjá familjuni hjá landsstýrislimum.

### 4.1.3 Ráðharrabilur

Landsstýrislimir kunnu fáa frían bil uttan førara at ráða yvir. Teir landsstýrislimir, sum taka av hesum tilboði, verða skattaðir av ráðharrabilinum á sama hátt sum aðrir skattaborgarar við fríum bili frá arbeiðsgevaranum.[6]

### 4.1.4 Samskiftisútreiðslur

Landsstýrislimir hava rætt til fría telefon, frítt internethald og fría teldu.[7]

### 4.1.5 Fráfaringarløn

Sambært §10  hava landsstýrislimir rætt til fráfaringarløn, sum svarar til mánaðarlønina í starvinum.

Fráfaringarlønin verður goldin í 1 ½ mánað fyri hvørt byrjað heilt ár, viðkomandi hevur verið í starvinum sum landsstýrislimur. Fráfaringarlønin verður tó altíð goldin í minsta lagi í 3 mánaðir og í mesta lagi í 12 mánaðir.

Tað ber ikki til at fáa fráfaringarløn sum landsstýrislimur og løn sum landstingslimur samstundis.

Um tann, ið hevur rætt til fráfaringarløn, doyr, meðan hann er í starvinum, ella meðan hann fær fráfaringarløn, fáa eftirsitandi hjúnafelagi, rætt til hansara fráfaringarløn, tó hægst 3 mánaðir.

### 4.1.6 Eftirlønarviðurskifti

Eftirlønarviðurskiftini verða lýst í §12 og hava eftirlønarviðurskiftini síðani 1. januar 2004 verið skipaði soleiðis, at goldið verður til eina privata skipan í einum pensjónskassa við sæti í Grønlandi. Talan er um eina eftirlønarskipan við leypandi útgjaldi (ratupensjón, lívrentu ella eina blanding av báðum). Inngjaldið til skipanina er 10% av lønini frá arbeiðsgevaranum, og 5% verða trekt av lønini hjá landsstýrisliminum. Fólk, sum eru yvir 50 ár, tá ið tey gerast landsstýrislimir, kunna velja at fáa eftirlønargjaldið útgoldið sum løn, og fáa tey tá samsvarandi ongan eftirlønarrætt.

Áðrenn eftirlønarskipana, sum kom í gildi tann 1. januar 2004, fingu landstings- og landsstýrislimir/formenn tænastumannaeftirløn. Tænastumannaeftirlønin verður útroknað frá teirra tænastumannaaldri, sum limir í landstinginum og landsstýrinum. Enn eru nøkur landstings- og landsstýrislimir/formenn, sum fáa tænastumannaeftirløn, tí koyra skipanir framvegis síðuleypandi.

Treytin fyri at fáa eftirløn er, at limirnir hava sitið minst 1 ár tilsamans.

Eftirlønin verður goldin frá limirnir er fyltir 60 ár, men verður ikki goldin samstundis sum lønarsamsýning verður goldin.

## 4.2 Ísland

Samsýningar v.m. til ráharrar er ásett í lóg nr. 115 frá 23. september 2011 "Lög um Stjórnarráð Íslands", sum seinast er broytt 28. juni 2023, lóg nr. 88 frá 28. juni 1995 "Lög þingfararkaup alþingismanna og þingfararkostnað", sum seinast er broytt 21. juni 2023  og reglugerð nummar

---

[6] Forskrift for Inatsisartutformands repræsentations- og rejseudgifter, frigoder og modtagelse af gaver

[7] Notat "Generelle retningslinjer vedrørende centraladministrationens mobiltelefoner og tjenestetelefoner i hjemmet" frá Grønlands Hjemmestyre

1281 frá 7. apríl 2015 "Reglugerð um bifreiðamál ríkisins". Meðan samsýningar v.m. til altingslimir fylgja lønargrundarlaganum hjá alment settum í Íslandi.

Síðani juli 2018 eru lønirnar ásettar við lóg, soleiðis at lønarupphæddin, sum var galdandi, tá lógin varð samtykt, verður hækkað hin 1. juli á hvørjum ári. Hetta verður gjørt soleiðis, at lønin verður javnað hvørt ár í juli við støði í hagtølum yvir almennu lønarhækkingarnar árið fyri. Harumframt hevur Altingið eina "Forsætisnevnd", hvørs limir eru altingsformaðurin og fimm altingsvaraformenn. Henda nevndin hevur m.a. um hendi at áseta reglur um rakstur tingsins, herundir ymiskar samsýningar, so sum løn fyri álitissessir (nevndarformenn o.a.), ferðaendurgjøld, vistarhaldskostnaðir, trygging og aðrar útreiðslur í sambandi við tingmannastarvið.

### 4.2.1 Lønarsamsýning

Sambært 15 í lóg nr. 88 fáa stjórnarleiðarar, ráharrar og altingslimir í Íslandi eina samsýning, sum er ásett við lóg, sum hvørt ár 1. juli verður javna við støði í hagtølum yvir almennu lønarhækkingarnar fyri árið. Tó hevur altingið gjørt serlóggávur, har samtykt er at løn pr. 1. juli 2023 hækkar 2,5% í staðin fyri galdandi lóg fyri altinginum og ráharrunum. Eins sum lønin er hækkað 1. januar 2024.

Frá 1. januar 2024 eru lønirnar hjá ávikavist stjórnarleiðaranum, ráðharrum og altingslimum í Íslandi hesar (umroknað frá ISK til DKK til kurs 0,04947 tann 1. januar 2024):

| Lønarsamsýning, kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---:|---:|
| Stjórnarleiðarin | 132.595 | 1.591.140 |
| Ráðharrar og altingsformaður | 119.770 | 1.437.245 |
| Altingslimur | 72.218 | 866.620 |

### 4.2.2 Fríur bústaður og kostnaðarendurgjald

Sambært §6 í lóg 88 hava ráðharrar, sum eru fastbúgvandi uttanfyri høvuðsstaðarøkið, og sum fáa sær innivist í Reykjavík, eitt kostnaðarendurgjald uppá 8.519 kr. um mánaðin.

Ráðharrar, sum búgva uttanfyri høvuðsstaðarøkið, og sum velja at ferðast til og frá arbeiði, fáa koyriútreiðslurnar endurgoldnar umframt ein triðing av fulla kostnaðarendurgjaldinum svarandi til 2.840 kr. um mánaðin.

Hevur ráharrin dupult húsarhald, fáa teir 40% av kostnaðarendurgjaldinum svarandi til 3.407 kr. um mánaðin.

Kostnaðarendurgjaldið er skattskyldugt.

Kostnaðarendurgjaldið til ráðharrar kann samanfatast soleiðis (umroknað frá ISK til DKK til kurs 0,04947 tann 1. januar 2024):

| Lønarsamsýning, kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---:|---:|
| Kostnaðar endurgjald fyri bústað uttan fyri Reykjavík | 8.519 | 102.225 |
| 1/3 av kostnaðarendurgjaldinum (pendlarar) | 2.840 | 34.075 |
| Dupult húsarhald (40%) | 3.407 | 40.890 |

### 4.2.3 Ráðharrabilur

Ráðharrarnir hava ráðharrabil, sambært §8 í reglugerð nr. 1281. Vanliga mannagongdin er at ráðharrin hevur bilførara í tænastu ørindum. Sum útgangsstøði skal bilurin bert brúkast í tænastuørindum, men møguleikarnir verða umsitnir rúmsátt, og tað er upp til hvønn einstakan ráðharra at avgera, hvussu hetta skal umsitast, t.e. í hvønn mun flutningur í privatum ørindum fer fram.

Ráðharrar verða skattaðir av ráðharrabilinum á sama hátt sum aðrir skattaborgarar við fríum bili frá arbeiðsgevaranum.

### 4.2.4 Samskiftisútreiðslur

Ráðharrar hava rætt til frítt skrivstovuhald, telefon, telduútgerð, o.l., sambært §9 í lóg nr. 88.

### 4.2.5 Fráfaringarløn

Sambært §14 í lóg nr. 88 fáa ráðharrar fráfaringarløn í 3 mánaðir eftir at verða farnir úr starvi. Hevur ein ráðharri verið í starvinum í meira enn eitt ár, fær hann fráfaringarløn í 6 mánaðir, svarandi til løn hansara sum ráðharri. Tó verður virðið av møguligari aðrari inntøku í fráfaringartíðarskeiðinum drigið frá fráfaringarlønini eftir nærri reglum.

### 4.2.6 Eftirlønarviðurskifti

Altings- og tjórnarlimir eru fevnir av lóg nr. 141 frá 20. desember 2003 "Lög um eftirlaun forseta Íslands, ráðherra, alþingismanna og hæstaréttardómara", sum seinasta er broytt 27. juni 2019. Hendan lógin er um almenna eftirlønargrunnin. Hesin eftirlønargrunnur er opin fyri øllum starvsfólkum hjá statinum.

Ráðharrar gjalda 5% av sínari løn inn í almenna eftirlønargrunnin. Harafturat rindar staturin 11,5% av lønini sum partur arbeiðsgevarans.

Ísland hevur áður havt eina tænastumannaeftirlønarskipan. Har ráðharrar kundu uppá upp til 70% av lønini í eftirløn. Enn eru nakrir fyrrverandi ráðharrar, sum fáa hesa tænastumannaeftirløn, tí koyra skipanir framvegis síðuleypandi.

## 4.3 Danmark

Samsýningar v.m. til ráðharrar og folkatingslimir er ásett í ávikavist lógarkunngerð nr. 273 frá 20 apríl 2004 um "vederlag og pension m.v. for ministre", sum seinast er broytt 22. mai 2017, og lógarkunngerð 294 frá 7. mars 2022 um "valg til folketinget", sum er seinast broytt 15. mai 2023.

### 4.3.1 Lønarsamsýning

Sambært §1, stk. í lógarkunngerð nr. 273 verða allir ráðharrar í Danmark samsýntir við støði í eini grundupphædd, sum verður javnað á sama hátt sum tænastumannalønir.

Stjórnarleiðarin fær 125% av nevndu grundupphædd, uttanríkismálaráðharrin, fíggjar-málaráðharrin og 2. ráðharri í statsráðsraðfylgjuni (*statsråds-rækkefølgen*) fáa 110% av nevndu grundupphædd, meðan aðrir ráðharrar fáa grundupphæddina.

Samsýningin til ráðharrar og limir í Fólkatinginum í Danmark er frá 1. apríl 2024:

| Lønarsamsýning, kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---|---|
| Stjórnarleiðarin og formaður í Fólkatinginum | 145.853 | 1.750.241 |
| Uttanríkis- og fíggjarmálaráðharrin | 128.351 | 1.540.212 |
| Aðrir ráðharrar | 116.683 | 1.400.193 |
| Fólkatingslimir | 61.662 | 739.949 |

Er ein ráðharri eisini limur í Fólkatinginum, verður grundupphæddin sum fólkatingslimur drigin frá grundupphæddini sum ráðharri.

### 4.3.2 Fríur bústaður og kostnaðarendurgjald

Sambært §1, stk. 8 í lógarkunngerð 273 verður satsurin fyri frían bústað og kostnaðarendurgjald verður árliga javnaður.

Ráðharrar, sum hava fastan bústað uttanfyri høvuðsstaðarøkið, og sum verða mettir at hava tørv á einum eyka bústaði í høvuðsstaðnum, fáa eitt árligt bústaðarendurgjald upp til 122.234 kr., harav 87.309 kr. (maks) móti skjalprógvaðum bústaðarútreiðslum og 34.925 kr. til dupult húsarhald uttan skjalprógv. Bústaðarendurgjaldið er skattafrítt.

Ráðharrar fáa sama kostnaðarendurgjald sum fólkatingslimir til at rinda útreiðslur í sambandi við starvið. Kostnaðarendurgjaldið er 72.122 kr. um árið tann 1. oktober 2023. Kostnaðarendurgjaldið er skattafrítt.

### 4.3.3 Ráðharrabilur

Ráðharrar hava møguleika fyri at gera nýtslu av ráðharrabilum við førara. Í einum vegleiðingarskrivi frá Forsætismálaráðnum eru ásettar reglur fyri m.a. nýtslu av ráðharrabilum. Ráðharrabilur er skattafríur.[8]

### 4.3.4 Samskiftisútreiðslur

Allar útreiðslur í sambandi við telduútgerð, telefonútgerð og telesamskifti verða dekkaðar. Ráðharrar verða skattaðir av fríari telefon.[9]

### 4.3.5 Fráfaringarløn

Sambært §3 í lógarkunngerð nr. 273 verður fráfaringarløn latin í einum tíðarskeiði svarandi til helvtina av heilum mánaðum, sum viðkomandi tilsamans hevur verið ráðharri, tó í minsta lagi fráfaringarløn í 6 mánaðir og í mesta lagi 36 mánaðir. Fráfaringarlønin er hin sama sum ráðharralønin. Tó verður virðið av møguligari aðrari inntøku í fráfaringartíðarskeiðinum drigið frá fráfaringarlønini eftir nærri reglum.

### 4.3.6 Eftirlønarviðurskifti

Eftirlønarviðurskiftini hjá ráðharrum verður ásett í §4 í lógarkunngerð nr. 273. Ráðharrar vinna sær eftirlønarrætt á líknandi hátt sum tænastumenn hjá statinum, men eftirlønaraldurin verður tó vunnin munandi skjótari enn hjá tænastumonnum.

[8] Notat frá Skatteministeriet fra 28. oktober 2022 j.nr. 2022 -13514, punkt 1.b
[9] Notat frá Skatteministeriet fra 28. oktober 2022 j.nr. 2022-13514, punkt 1.c.

Ráðharrar fáa eftirløn svarandi til eina tænastumannaeftirløn á skalatrini 49. Eftirlønaraldurin verður vunnin soleiðis, at ráðharrar, sum hava sitið minni enn eitt ár, fáa onga eftirløn, meðan teir, sum hava sitið longri, vinna sær eftirløn eftir einum nærri ásettum skala. Ein ráðharri hevur vunnið sær rætt til fulla eftirløn aftaná at hava sitið sum ráðharri í 8 ár svarandi til fulla tænastumannaeftirløn á skalatrini 49, sum er 361.736 kr. pr. 1. apríl 2023, um hann fer frá áðrenn pensjónsaldur, og 313.625 kr. pr. 1. apríl 2023, um hann er pensionistur, tá ið hann fer frá.[10]

## 4.4 Noreg

Samsýningar v.m. til ráðharrar og stórtingslimir eru ásettar í lóg nr. 106 frá 20. desember 2016 um "Godtgjørelse for stortingsrepresentanter" sum seinast er broytt við lóg nr. 89 frá 15. desember 2023.

### 4.4.1 Lønarsamsýning

Noregi hevur valt eitt lønarráð, nevnt "Stortingets Lønnskommisjon". Ráðið skal á hvørjum ári taka sær av at áseta lønirnar hjá ráðharrum og stórtingslimum. Lønarásetingarnar skulu tó góðkennast av Stórtinginum.

Lønarráðið hevur ikki um hendi at áseta onnur viðurskifti so sum eftirløn, innivist, bilskipan, kostnaðarendurgjald o.a., sum er umfata av lóg nummar 106 frá 20. desember 2016. Eftirlønarviðurskiftini og fráfaringarløn eru regulerað við lóg, meðan onnur starvsviðurskifti í stóran mun verða ásett av forsætismálaráðharranum.

Samsýningin til ráðharrar og Stórtingslimir í Noreg frá 1. mai 2024 er (umroknað frá NOK til DKK til kurs 0,6313 tann 1. mai 2024):

| Lønarsamsýning, kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---:|---:|
| Stjórnarleiðarin og stórtingsforsetin | 108.225 | 1.298.696 |
| Ráðharrar | 87.922 | 1.055.064 |
| Stórtingslimir | 61.604 | 739.252 |

Lønirnar eru ikki beinleiðis knýttar at nøkrum lønarsáttmála á arbeiðsmarknaðinum, men lønarráðið skal taka atlit at lønargongdini í samfelagnum.

### 4.4.2 Fríur bústaður og kostnaðarendurgjald

Fyri ráðharrar verða reglur um frían bústað og kostnaðarendurgjald ásettar í §10 í lóg nr. 106.

Allir ráðharrar, sum búgva meira enn 40 km frá arbeiðsplássinum, kunnu fáa frían bústað í Oslo. Bústaðurin er skattafríur. Harumframt fáa ráðharrar vikuliga ferð til heimstaðin. Hava ráðharrarnir børn, undir 20 ár fáa teir tvær vikuligar feðir til heimstaðin.

[10] Faktaark " Ministervederlag, eftervederlag og pension" frá Medarbejder og Kompetence Styrelsen, dagfest 1. apríl 2023

### 4.4.3 Ráðharrabilur
Ráðharrar hava ráðharrabil við førara eftir eini líknandi skipan, sum er galdandi í Danmark. Ráðharrabilurin er sum útgangsstøði skattafríur til tænastukoyring.

### 4.4.4 Samskiftisútreiðslur
Allar útreiðslur í sambandi við telduútgerð, telefonútgerð og telesamskifti verða dekkaðar. Skattur verður rindaður av fríari nýtslu.

### 4.4.5 Fráfaringarløn
Sambært §15 í lóg nr. 106 fáa ráðharrar fráfaringarløn í upp til 12 mánaðir. Eftir at ráðharrar hava fingið fráfaringarløn í 3 mánðir, kunnu teir bert fáa fráfaringarløn, um teir kunnu prógva at teir aktivt leita eftir arbeiði ella eru undir eini førleikagevandi eftirútbúgving. Fráfaringarløn verður ikki veitt, um fyrrverandi ráðharrin er í ferð við at stovna egið virki.

Hevur ráðharri aðra intøku í tíðarskeiðinum hann fær fráfaringarløn, verður fráfaringarlønin mótroknað í aðari løn, sum er yvir 5.000 NOK.

### 4.4.6 Eftirlønarviðurskifti
Nýggj eftirlønarlóg, "Lov om pensjonsordning for storttingsrepresentanter og redjeringsmedlemmer", varð sett í gildi í Noregi 1. januar 2012, og sum seinast er broytt 1. juni 2022.

Eftirlønarlógin byggir á somu prinsippir, sum nýggja alduspensjónin í "Folketrygden", har pensjónin verður latin sum eitt beinleiðis ískoyti til alduspensjónina frá "Folketrygden".

Eftirlønin er skipa á tann hátt, at eftirlønaruppsparingin er 6,03% av lønarsamsýning, sum er upp til 7,1 ferðir grundupphæddin í "Folketrygden", sum svar til eina inntøku uppá 842.202 NOK. Grundupphæddin er pr. 1 mai 2023 118.620 NOK. Eftirlønaruppsparingin er 24,13% av lønarsamsýning í millum 7,1-12 ferðir grundupphæddina, tað svarar til eina innøku uppá 842.202 NOK – 1.423.440 NOK. Eftirlønaruppsparingin verður javna við lønarvekt fram til aldurseftirlønaraldur.

Árliga eftirlønin verður roknað við at býta innvunnin pensjónsrættindi við einum deilitali. Deilitalið avspeglar væntaðan livialdur aftaná eftirlønaraldurin. Tað merkir, at eftirlønin verður livialdursjavnað á sama hátt sum "Folketrygden".

Aldurseftirlønin kann takast út fleksibult frá 62 til 75 ár eftir somu treytum sum í "Folketrygden". Aldurseftirlønin undir útgjalding verður javnað samsvarandi lønarvøkstrinum, tó verða 0,75% frátrekt. Tað vil siga, at eftirlønargjaldið verður javnað sum "Folketrygden". Aldurseftirløn, sum verður tikin út, áðrenn viðkomandi er 67 ár, skal umroknast frá mánaðinum eftir, at viðkomandi er fylt/ur 67 ár. Tað verður gjørt á tann hátt, at pensjónsgrundarlagið verður javnað við lønarvøkstrinum frá tí, at pensjónin varð tikin út og fram til umrokningartíðspunktið.

Tað eru skiftisreglur, sum tryggja rættindi uppvunnin eftir gomlum eftirlønarskipani. Fyri tey, sum bæði uppvinna eftirløn eftir gomlu og nýggju eftirlønarskipani, eru reglur um, at eftirlønin ikki má verða hægri enn roknaða hægsta pensjónin. Stjórnarlimir, sum ikki høvdu uppvunnið eftirløn áðrenn 1. januar 2012, uppvinna eftirløn eftir nýggju reglunum frá ávikavist 1. oktober 2009 og 1. januar 2012.

# 5 Lønarlagið í føroyska samfelagnum

Av arbeiðssetninginum hjá nevndini sæst, at nevndin í sínum tilmæli skal hava atlit til lønarlagið í landinum yvirhøvur og til ta tign og ábyrgd, sum liggur í størvunum hjá landsstýrisfólkum.

Í almennu lønarhagtølunum, finnast ikki neyv tøl fyri lønarlagið hjá einstøku lønarbólkunum. Vitandi um, at Hagstovan arbeiðir við at fáa meira neyv lønarhagtøl, hevur nevndin havt samskifti við Hagstovuna um lønargreiningar. Trupulleikin við núverandi lønarhagtølum er smb. Hagstovuni, at tey eru býtt upp í vinnugreinar og verða lýst ella greinað samlað ella horisontalt. T.v.s at lønarhagtølini vísa lønarlagið sum miðallønina fyri allar starvsbólkar í vinnugreinini, og ikki fyri einstøku starvsbólkarnar. Hagstovan er í gongd við at greina lønarhagtølini soleiðis, at tað verður gjørligt at lýsa vinnugreinarnar vertikal. Tá verður møguligt at síggja lønarlagið fyri ymisku starvsbólkarnar, td. stjórar, innan ymisku vinnugreinarnar.

Somuleiðis er ikki møguligt at síggja um broytingar í lønarlagnum koma frá broyttari arbeiðstíð, td. yvirtíð ella frá hægri tímaløn/fasta løn. Serliga lønarlagið hjá privatu vinnuni er lítið gjøgnumskygt. Kollektivu sáttmálarnir innan tað privata eru minimumssáttmálar. Hetta merkir, at tað ber til at løna starvsfólki omanfyri ásettar sáttmálalønir, og alt eftir útboð og eftirspurningi er hetta rættuliga vanligt í ávísum vinnugreinum. Afturat hesum eru leiðandi starvsfólk og stjórar oftast ikki fevnd av kollektivum sáttmálum, men tey eru sett eftir individuellum avtalum.

Tað almenna er hinvegin bundið av at fylgja kollektivu sáttmálunum fult og heilt.

Nevndin hevur, lutvíst saman við Hagstovuni, roynt at gjørt eina beinleiðis samanbering av generella lønarlagnum í Føroyum og grannalondunum fyri at kanna, á hvørjum støði lønirnar hjá løgmanni og landsstýrisfólkunum er í mun til lønirnar hjá stjórnarleiðarum og stjórnarlimum í hinum londunum. Tað var mett ikki rætt at gera eina tílíka beinleiðis samanbering, tí hagtølini ikki eru beinleiðis samanberilig. Út frá teimum tølum, vit hava, meta vit tó at støðið er hóskandi.

Hagstovan er komin væl ávegis við nýggju lønargreiningunum, men hagtølini eru tó ikki tøk enn. Vit meta, at tá hesi verða tøk, verður hetta ein bati fyri komandi greiningar av lønunum hjá landsstýrisfólkunum.

Fyri at fáa eina fatan av lønarlagnum á privatu og almennu arbeiðsmarknaðinum hevur nevndin brúkt upplýsingar frá Hagstovu Føroya um lønarútgjaldingar (A-inntøkur) í novembur 2023, býtt á høvuðsvinnugreinar og lønarintervallir. Høvuðsvinnugreinarnar eru "Almenn o.o. tænasta", "Byggivinna o.o. tilvirking", "Fiskivinna o.o. ráevnisvinna" og "Privatar tænastuvinnur". November mánaði er valdur, tí hesin sambært Hagstovuni er best umboðandi mánaðin á árinum til at gera eina slíka uppgerð.

## 5.1 Samanbering - privata tænastuvinnan v.m.

Skal lønarsamsýningin til landsstýrisfólk samanberast við lønarlagið í privatu vinnuni, meta vit, at starvsviðurskiftini hjá landsstýrisfólki best kunnu berast saman við starvsviðurskiftini í privatu tænastuvinnuni, og tískil verða niðanfyri einans víst tøl frá hesi høvuðsvinnugrein umframt innan almennu tænasturnar.

**Lønarútgjaldingar í privatu tænastuvinnuni og til almennar tænastur í novembur 2023, býtt í lønarintervallir**

| | Privatar tænastuvinnur | | Almenn o.o. tænasta | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal av lønargjaldingum | % | Tal av lønargjaldingum | % |
| 0-40.000 | 10.367 | 80,25% | 12.937 | 84,39% |
| 40-50.000 | 1.215 | 9,40% | 1.549 | 10,10% |
| 50-60.000 | 661 | 5,12% | 504 | 3,29% |
| 60-70.000 | 283 | 2,19% | 150 | 0,98% |
| 70-80.000 | 159 | 1,23% | 77 | 0,50% |
| 80-90.000 | 85 | 0,66% | 39 | 0,25% |
| 90-100.000 | 50 | 0,39% | 25 | 0,16% |
| 100.000+ | 99 | 0,77% | 49 | 0,32% |
| | 12.919 | 100% | 15.330 | 100% |
| Inntøka á 60.000 og hægri | 676 | 5% | 340 | 2% |
| Inntøka á 70.000 og hægri | 393 | 3% | 190 | 1% |
| Inntøka á 80.000 og hægri | 234 | 2% | 113 | 1% |

Kelda: Hagstova Føroya - Lønargjaldingar er útgoldin A-inntøka.

Av talvuni sæst, at mánaðarliga lønarsamsýningin til landsstýrisfólk, sum í juni 2024 var 82 tkr., liggur í ovara endanum av lønarútgjaldingunum. Í privatu tænastuvinnunum eru 1,82% av mánaðarligu lønunum hægri enn 80 tkr., meðan samsvarandi talið í almennu tænastunum er 0,73%. Hinvegin vísir talvan eisini, at 1,16% av lønarútgjaldingunum í privatum tænastuvinnum og 0,48% av almennu lønunum eru hægri enn núverandi lønin til landsstýrisfólk. Um lønarsamsýningin til landsstýrisfólk skal liggja í ovasta %-bólki, í mun til privatu tænastuvinnuna, so skuldi lønin til landsstýrisfólkini hækka við 21,73%.

Tað skal viðmerkjast, at tølini omanfyri einans vísa sjálva A-inntøkuna, sum er útgoldin í privatu tænastuvinnuni í novembur 2023. Ongar upplýsingar fyriliggja um møgulig eftirlønargjøld ella fríar ágóðar hjá hesum starvsbólki. Heldur ikki er óvanligt, at tað í privatu tænastuvinnuni verður útgoldið vinningsbýti til eigarar av fyritøkum, sum samstundis fáa A-inntøku frá fyritøkuni. Tí skal eitt ávíst fyrivarni takast í hesum sambandi.

## 5.2 Løgmansstjórin og aðalstjórar

Tað er viðkomandi at samanbera lønarlagið hjá landsstýrisfólkum við lønarlagið hjá næstu embætisfólkum teirra, t.v.s. løgmansstjóranum og aðalstjórunum, sum samstundis eru hægst løntu embætisfólk í miðfyrisitingini í Føroyum.

Seinnu árini eru ávísir aðalstjórar settir í tíðaravmarkað starv, og harvið hava teir eisini fingið eina eyka viðbót omaná vanligu aðalstjóralønina.

Løgmansstjórin og aðalstjórarnir eru løntir í ávikavist 40. og 39. lønarflokki og fáa harumframt eina mánaðarliga aðalstjóraviðbót.

Landsstýrið hevur nýliga gjørt broytingar í lønarviðurskiftunum hjá aðalstjórum, sum verða settir frameftir. Teir fara frá at verða settir sum tænastumenn til at verða settir í tíðaravmakað starv. Harvið fáa teir, umframt løn og aðalstjóraviðbót, eisini eina viðbót á 20%.

Ynskir aðalstjóri við setan farloyvi frá eini fulltrúa setan, verður bert givið 10% í viðbót fyri tíðaravmarkaða setan. Løgmansstjóri og aðalstjórar fáa ikki aðrar samsýningar. Samlaða lønarinntøkan frameftir verður:

| Lønarsamsýning íroknað viðbót, kr. | Grundløn, mánaðarlig | Aðalstjóra-viðbót | Viðbót fyri tíðar-avmarkaða seta | Mánaðarlig løn | Árlig løn | Eftirløn |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Løgmansstjóri | 74.682 | 6.380 | 14.936 | 95.999 | 1.151.985 | 15% |
| Aðalstjóri | 68.046 | 6.380 | 13.609 | 88.035 | 1.056.425 | 15% |

Kelda: Fíggjarmálaráðið (Lønardeildin).

Verður lønarsamsýningin til løgmann og landsstýrisfólk samanborin við lønina hjá løgmansstjóranum og aðalstjórunum sæst, at eftir nýggju lønarskipanini hjá løgmanns- og aðalstjórum fær løgmaður áleið 1 tkr. meira um mánaðin í lønarsamsýning enn løgmansstjórin og uml. 9 tkr meira enn aðalstjórar.

Í verandi løtu eru tríggir aðalstjórar settir eftir nýggju skipanini. Løgmansstjórin og hinir aðalstjóranir eru allir settir eftir gomlu skipani.

Eftir nýggja lønarskipanini hjá løgmans- og aðalstjórum fáa landsstýrisfólkini smáar 14 tkr. minni í løn enn løgmansstjórin og fáa knappar 6 tkr. minni um mánaðin í lønarsamsýning enn aðalstjórarnir.

Tað er tó ikki óvanligt uttanlands, at lønin hjá hægstu embætisfólkum liggur omanafyri lønina hjá løgmanni og landsstýrisfólkum.

Løgmansstjóri og aðalstjórar fáa samskiftisútgerð so sum fartelefon, farteldu og internetsamband eftir somu siðvenju sum landsstýrisfólk. Tá ið tey ferðast í tænastuørindum, fylgja tey teimum ásetingum um dag-, náttarviðbót og koyripening, sum eru avtalaðar millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins.

## 5.3 Hægstu lønir í almenna geiranum

Niðanfyri er talva, sum vísir miðal av teimum10 hægstu lønunum í almenna geiranum. Talvan vísur bert lønarútgjaldingar (A-inntøka).

| Miðal top 10 lønir í almenna geiranum | Mánaðarlig løn | Árlig løn |
|---|---|---|
| Almenni geirin (S13) | 138.478 | 1.661.732 |
| Allmenni geirin og almennar fyritøkur (S11, S12 og S13) | 142.326 | 1.707.909 |

Kelda: Hagstova Føroya.

Almenni geirin eru stovnar og feløg, sum ikki eru marknaðardrivin. Her er talan um tey størru arbeiðsplássini, ið vanliga umsita stórar játtanir og hava ein starvsfólkahóp á fleiri enn 500 fólk. Stjórarnir hava vanliga eisini ein sjónligan leiklut í almenna rúminum.

Almennar fyritøkur eru partafeløg, har landið eigur meria enn helmingin av partapeninginum, umframt stovnar, sum virka á fría marknaðinum.

# 6 Viðgerð og tilmæli

## 6.1 Inngangur

Við støði í frammanfyri standandi gjøgnumgongd av verandi lønarlagi og skipanum í Føroyum og teimum Norðurlondum, sum vit hava samanborið við, verður í stuttum tikið samanum verandi skipan fyri hvørt økið sær. Síðan verður umrøtt, hvørt verandi skipan er hóskandi, samanborið við samfelagsgongdina síðani verandi skipan varð sett í gildi, og umrøtt verður um samfelagslig atlit tala fyri, at broytingar verða gjørdar.

At enda verða niðurstøða og tilmæli gjørd fyri einstøku økini.

## 6.2 Grundarlagið undir samsýning til løgmann og landsstýrisfólk

Samsýningin til løgmann og landsstýrisfólk hevur síðani 1976 verið ásett við støði í lønartalvunum hjá tænastumonnum landsins.

Javnan hevur verið ført fram, at tað kann vera ein trupulleiki, at samsýningin til landsstýrisfólk verður ásett við grundarlagi í lønartalvuni hjá tænastumonnum, tí landsstýrið sum samráðingarpartur óbeinleiðis kann hava ávirkan á sína egnu samsýning.

Um hugt verður at gongdini í lønarlagnum hjá tænastumonnum tey seinastu árini sæst, at gongdin í stóran mun hevur verið sum á almenna arbeiðsmarknaðinum annars. Orsøkin til hetta er, at lønarsamráðingar sum oftast beinleiðis ella óbeinleiðis verða ávirkaðar av gongdini í samfelagnum sum heild, eisini av lønarlagnum hjá øðrum fakbólkum. Sigast kann sostatt, at hóast skiftandi landsstýri síðani 1976 møguliga hava havt ein teoretiskan møguleika at ávirka sína egnu samsýning, so eru ongar ábendingar um, at hetta hevur verið ein veruligur trupulleiki.

Leggjast kann afturat, at tað er ikki óvanligt at brúka lønartalvuna fyri tænastumenn fyri hægri løntar starvsbólkar innan ta almenna. Nevnast kann, at í desembur 2023 varð álit lagt fram um lønir hjá aðalstjórum og løgmansstjóranum, sum eisini vísir til lønartalvuna hjá tænastumonnum.

Um vit samanbera við skipanir í grannalondum okkara, so hevur Grønland somu skipan, har samsýningin til landstings- og landsstýrislimir er tengd at lønartalvuni fyri tænastumenn. Í Danmark er serlig lóg galdandi fyri samsýning til ráðharrar, men upphæddirnar í lógini verða javnaðar á sama hátt sum tænastumannalønirnar. Í Íslandi verða lønirnar javnaðar á hvørjum árið við støði í almenna lønarlagnum. Í Noregi er eitt serliga lógarásett lønarráð, sum á hvørjum árið skal taka sær av at áseta lønir hjá ráðharrum og stjórtingslimum.

Við støði í omanfyri standandi, metir nevndin ikki, at tað er nakað, sum talar fyri at broyta skipanina, vit hava í Føroyum.

<u>Nevndin mælir til, at lønartalvan hjá tænastumonnum landsins framvegis skal verða grundarlagið undir lønarsamsýningini til løgmann og landsstýrisfólk.</u>

## 6.3 Lønarsamsýning til løgmann og landsstýrisfólk

Eftir galdandi lóg, sum kom í gildi á heysti 2015, fær løgmaður samsýning svarandi til 130% av lønini í 40. lønarflokk í lønartalvuni fyri tænastumenn landsins, svarandi til 1.165.043 kr. árliga,

meðan landsstýrisfólk fáa samsýning svarandi til 110% av lønini í 40. lønarflokk í lønartalvuni fyri tænastumenn landsins, svarandi til 985.805 kr. árliga.

Broytingin í 2015 varð gjørd sambært tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m frá táverandi nevnd.

Broytingin hevði við sær eina munandi lønarhækkan. Samstundis vóru tó eisini aðrar broytingar gjørdar, sum høvdu við sær, at borðfæið varð strikað, og at eftirlønin varð broytt frá at vera tænastumannaeftirløn til at vera ein eftirlønaruppsparing.

Uppgávan hjá hesari nevndini er at meta og koma við tilmæli um, hvør samsýning er hóskandi.

Av lógini framgongur, at nevndin í sínum tilmæli skal hava atlit til lønarlagið í landinum yvirhøvur og til ta tign og ábyrgd, sum liggur í størvunum.

Nevndin, sum sat í 2013 metti, at í mun til ta tign, ábyrgd og tann leiklut, sum løgmaður og landsstýrisfólk hava sum landsins leiðsla, so er tað lønarlagið á leiðslustøði, ið samanberast skal við. Nevndi valdi tískil at samanbera við lønarlagið hjá leiðslum innan almennu fyrisitingina og leiðslum innan tað privata vinnulívið. Nevndin greinaði hetta í álitinum.

Tað skal, sum áður nevnt, gerast vart við, at samanbering av beinleiðis lønarsamsýning hjá landsstýri við beinleiðis lønarsamsýning til aðrar samfelagsbólkar ikki gevur eina rættvísandi mynd, og hetta má tí takast við ávísum fyrivarni.

Verandi skipan hevur nú verið í gildi síðani 2015. Nevndin metir, at lønarlagið hjá landsstýrisfólkum liggur á eini góðari leið í mun til onnur størv, sum metast kann við ísv. tign og lønarlagið í landinum yvirhøvur.

Samanborið við grannalond okkara, liggur lønin hjá løgmanni og landsstýrisfólkunum framvegis í lægra endanum, hon líkist mest lønarlagnum í Grønlandi.[11]

Nevndin metir hóast hetta, at verandi lønarlagið er hóskandi – eisini sæð í mun til lønarlagið í føroyska samfelagnum annars.

Sum nevnt í petti 4.3.1 er lønin ikki eins fyri allar ráðharrar í Danmark. Lønin hjá Uttanríkis- og fríggjarmálaráðharranum og næsta ráðharranum í statsraðfylgjuni fáa eina hægri løn enn aðrir ráðharrar.

Nevndin metur, at tað er viðkomadi at umhugsa, um skilagott er við líknandi skipan í Føroyum, har munur verður á lønunum til landsstýrisfólk alt eftir uppgávum, ábyrgd og arbeiðsbyrðu. Fyri at viðgera henda spurning til fulnar er neyðut at gera eina nágreiniliga lýsing av teimum føroysku viðurskiftunum.

<u>Nevndin mælir til, at broytingar ikki verða gjørdar í lønarlagnum hesum viðvíkjandi.</u>

[11] Sí fylgiskjal 2.

## 6.4 Fríur bústaður, kostnaðarendurgjald og ferðing

Hevur løgmaður fastan bústað uttan fyri høvuðsstaðarøkið, kann hann flyta til høvuðsstaðin í ein bústað, sum landið rindar.

Viðvíkjandi landsstýrismonnunum, so kann løgmaður játta landsstýrisfólkum endurgjald fyri útreiðslur til bústað í høvuðsstaðnum, um viðkomandi í starvstíðini hevur fastan bústað, har tað ikki er landfast, ella serlig viðurskifti gera seg galdandi. Fyri hvørt landsstýrisfólk verður í mesta lagi endurgoldið, móti kvittan, upp til 10.000 kr. pr. mánað fyri húsaleigu, el og hita.

Sum nú er, fær eitt landsstýrisfólk endurgjald eftir hesi skipanini. Vísandi til, at skipanin tykist gjøgnumskygd, rímilig og til stutta tíðarskeiðið, hendan skipanin hevur verið í gildi, <u>mælir nevndin til, at hendan skipanin fyribils heldur áfram.</u>

Sambært galdandi §1, stk. 4, í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna, fáa løgmaður og landsstýrisfólk, sum ikki eru úr Tórshavn, Hoyvík, Argjum ella Hvítanesi, afturat lønini árligt kostnaðarendurgjald, grundað á reglurnar um endurgjald til tænastu- og starvsmenn. Sum nevnt eru tað tvey landsstýrisfólk, sum fáa kostnaðarendurgjald í løtuni.

Við støði í álitinum frá 2012 varð í upprunauppskotinum LM-095/2013 skotið upp, at "Landið útvegar løgmanni og landsstýrismonnum ókeypis bil til tænastunýtslu, og landið rindar allar viðkomandi rakstrarútreiðslur." Mælt varð í viðmerkingunum til, at bilurin skal verða skattafríur, og at tað í kunngerð verður tryggjað, at bilar av sama slag verða útvegaðir, og at bilarnir, sum høvuðsreglu, bert verða brúktir í landsstýrismannastarvinum.

Verandi landsstýrislønarnevnd metir, at skipanin við kostnaðarendurgjaldi og ferðastuðli ikki er hóskandi fyri landsstýrisfólk. Tað undrar millum annað nevndina, at als einki endurgjald er fyri landsstýrisfólk í miðstaðarøkinum. Tað tykist sum verandi skipan leggur sum grund, at landsstýrisfólk einans flyta seg millum heimið og skrivstovuna í Tinganesi, og at tey ikki byrja teirra virki sum landsstýrisfólk, fyrr enn tey møta á skrivstovu síni.

Nevndin metir, at tey, ið røkja hesi størv, eru og skulu altíð verða tøk. Tað er tí ikki einans ein spurningur um rættin til flutning millum heim og arbeiðspláss, men eisini ein spurningur um at vera tøk, um tign og um at kunna flyta seg kring alt landið. Eitt landsstýrisfólk eigur tí at hava ein hóskandi bil at ráða yvir.

<u>Nevndin mælir til, at broyta lógina, soleiðis at løgmaður og landsstýrisfólk fáa ráðharrabil ístaðin fyri kostnaðargjald ella ferðastuðul. Mælt verður til, at hetta verður gjørt eftir leistinum, sum varð skotin upp í LM-095/2013.</u>

## 6.5 Samskiftisútreiðslur

Sambært §1, stk. 5 í løgtingslógini um samsýning og eftirløn landsstýrismanna útvegar og rindar landið fyri allar neyðugar samskiftisútreiðslur.

Nærri reglur um samskiftisútreiðslurnar eru ásettar í kunngerð frá 21. juli 2021.

<u>Nevndin heldur tí, at reglurnar eru nóg greiðar á hesum økinum, og eingin broyting er neyðug.</u>

## 6.6 Fráfaringarløn

Eftir verandi skipan hava landsstýrisfólk rætt til fráfaringarløn í 3 mánaðir, eftir at tey eru farin úr starvinum, um tey hava verið í landsstýrinum í styttri enn 1 ár. Er starvstíðarskeiðið longri enn 1 ár, verður veitt fráfaringarløn í 6 mánaðir.

Fær landsstýrisfólk í fráfaringartíðarskeiðnum samsýning ella bíðipening sum løgtingsfólk, verður hendan inntøkan mótroknað í fráfaringarlønini. Onnur møgulig inntøka verður ikki mótroknað.

Nevndin metir, at landsstýrisfólk, sum eru farin frá, ikki eiga at fáa tvær lønir í senn í meiri enn 3 mánaðir, uttan mun til um talan er um almennar lønir ella ikki. Hetta var eisini tað, sum stóð í uppruna uppskotinum til lógarbroytingarnar í 2015, men sum varð broytt undir viðgerðini í løgtinginum.

Henda broyting samsvarar eisini betur við treytir, sum vanliga eru galdandi fyri eitt nú starvsmenn.

<u>Nevndin mælir tí til, at lógin verður broytt, soleiðis at allar aðrar lønarinntøkur verða mótroknaðar í fráfaringarlønini, um so er, at fráfaringarløn verður veitt í eitt tíðarskeið, sum er longri enn 3 mánaðir.</u>

## 6.7 Eftirlønarviðurskifti

Áðrenn lógarbroytingina í 2015 høvdu landsstýrisfólk rætt til egineftirløn, tá ið viðkomandi hevði verið landsstýrisfólk í minsta lagi eitt ár samanlagt.

Hægsta eftirlønin hjá hesum landsstýrisfólkunum er 60% av eftirlønargevandi lønini í tí lønarflokki, sum landsstýrisfólk eru samsýnt eftir, tá ið viðkomandi fer úr starvi. Rætturin til fulla eftirløn varð vunnin eftir 8 ára starvstíð.

Aftaná lógarbroytingina í 2015 rindar landið upp í 15% av lønarsamsýningini, sum løgmaður og landsstýrisfólk fáa, afturat í eftirløn í eina eftirlønarskipan, sum er góðkend av landsstýrinum.

Eftirlønarprosentið verður ásett í mun til, hvussu leingi landsstýrisfólkið hevur verið landsstýrisfólk eftir gomlu skipanini og í mun til, hvussu leingi landsstýrisfólk hevur sitið á tingi (fylgiskjal 1).

Eftirlønarprosentið í eftirlønarlógini er nú broytt til at skula enda á 12% í mun til at tað upprunaliga var 15%.

Hóast hetta, metir nevndin, at eftirlønarprosentið skal haldast á 15%, og at skipanin er greið og skynsom, tí virðið samsvarar við eftirlønarskipanir og eftirlønarstøðið í samfelagnum annars, og tí útreiðslurnar av eftirlønarskipanini eru gjøgnumskygdar og kendar.

<u>Nevndin mælir til, at hendan skipanin heldur áfram.</u>

# 7 Keldulisti

## 7.1 Lógartilfar

**Føroyskar lógir:**
Løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., sum seinast broytt við kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015

Kunngerð § 3 í nr. 120 frá 21. juli 2021 um ferðing í embætisørindum og um samskiftisútreiðslur hjá landsstýrismonnum

Løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna

Løgtingslóg nr. 55 frá 29. mai 2024 um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk

**Útlendskar lógir:**

Landstingslóg nr. 22 frá 18. desember 2003 um "Vederlag m.v. til medlemmer af Landstinget og Landsstyret m.v.", sum seinast er broytt við Inatsisartutlóg (landstingslóg) nr. 42 frá 23. november 2017. (Grønland)

Lóg nr. 88 frá 28. juni 1995 "Lög þingfararkaup alþingismanna og þingfararkostnað", sum seinast er broytt 21. juni 2023. (Ísland)

Lóg nr. 141 frá 20. desember 2003 "Lög um eftirlaun forseta Íslands, ráðherra, alþingismanna og hæstaréttardómara" , sum seinasta er broytt 27. juni 2019. (Ísland)

Lóg nr. 115 frá 23. september 2011 "Lög um Stjórnarráð Íslands", sum seinast er broytt 28. juni 2023. (Ísland)

Reglugerð nummar 1281 frá 7. apríl 2015 "Reglugerð um bifreiðamál ríkisins. (Ísland)

Lógarkunngerð nr. 273 frá 20 apríl 2004 "Vederlag og pension m.v. for ministre", sum seinast er broytt 22. mai 2017. (Danmark)

Lógarkunngerð 294 frá 7. mars 2022 "Valg til folketinget", sum seinast er broytt 15. mai 2023. (Danmark)

Lóg nr. 60 frá 16. Desember 2011 "Lov om pensjonsordning for storttingsrepresentanter og redjeringsmedlemmer", sum seinast er broytt 1. juni 2022. (Noreg)

Lóg nr. 106 frá 20. desember 2016 um "Godtgjørelse for stortingsrepresentanter" sum seinast er broytt við lóg nr. 89 frá 15. desember 2023. (Noreg)

## 7.2 Annað tilfar

Álit um samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrismenn 2005

Álit um samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrismenn 2009

Álit um samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrismenn 2012

Álit um samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrismenn 2017

Álit um samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrismenn 2021

Álit um setanarviðurskifti hjá aðalstjórum 2023

Álit við tilmæli um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk

Upplýsingar um setanarviðurskifti hjá aðalstjorum frá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum

Lønarhagtøl fyri novembur 2023 frá Hagstovu Føroya

Forskrift for Inatsisartutformands repræsentations- og rejseudgifter, frigoder og modtagelse af gaver

Notat ”Generelle retningslinjer vedrørende centraladministrationens mobiltelefoner og tjenestetelefoner i hjemmet” frá Grønlands Hjemmestyre

Notat frá Skatteministeriet fra 28. oktober 2022 j.nr. 2022 -13514

Faktaark ” Ministervederlag, eftervederlag og pension” frá Medarbejder og Kompetence Styrelsen, dagfest 1. apríl 2023

## 7.3 Heimasíður

www.fmr.fo/lonardeildin/fakfelog/

www.logir.fo

www.logting.fo

www.ina.gl

www.lovgivning.gl

www.nalunaarutit.gl

www.althingi.is

www.island.is

www.ft.dk

www.regeringen.dk

www.retsinfo.dk

www.sktst.dk

www.lovdata.no

www.regjeringen.no

www.stortinget.no

www.spk.no

# Fylgiskjøl

Fylgiskjal 1: Talva við eftirlønargjaldprosent

Skjal 2 Yvirlit við galdandi lønar- og eftirlønarsamsýning í Føroyum, Grønlandi, Íslandi, Danmark og Noregi.

# Fylgiskjal 1

| Eftirlønargjaldsprosent<br>Ár í Landsstýrinum við tænastumannalíknandi eftirløn tvørturum og ár í Løgtinginum niðureftir | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 0 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 |
| 0 | 15 | 13 | 11 | 9 | 7 | 5 | 3 | 2 | 0 |
| 1 | 14 | 12 | 10 | 8 | 5 | 4 | 2 | 1 | |
| 2 | 13 | 11 | 9 | 7 | 4 | 4 | 1 | | |
| 3 | 12 | 10 | 8 | 5 | 3 | 3 | | | |
| 4 | 11 | 9 | 7 | 4 | 2 | 2 | | | |
| 5 | 10 | 8 | 5 | 3 | 1 | | | | |
| 6 | 9 | 7 | 4 | 2 | | | | | |
| 7 | 8 | 5 | 3 | 1 | | | | | |
| 8 | 7 | 4 | 2 | | | | | | |
| 9 | 6 | 3 | 1 | | | | | | |
| 10 | 5 | 3 | | | | | | | |
| 11 | 4 | 2 | | | | | | | |
| 12 | 3 | 1 | | | | | | | |
| 13 | 3 | | | | | | | | |
| 14 | 2 | | | | | | | | |
| 15 | 1 | | | | | | | | |
| 16 | 0 | | | | | | | | |

# Fylgiskjal 2

| **Samsýning pr. mðr.:** | Føroyar | Grønland | Ísland | Danmark | Noreg |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgmaður/Stjórnarleiðari | 97.087 | 94.201 | 132.595 | 145.853 | 108.225 |
| Landsstýrisfólk/Ráðharrar* | 82.150 | 72.544 | 119.770 | 116.683 | 87.922 |
| Tingforfólk | 97.087 | 94.201 | 119.770 | 145.853 | 108.225 |
| Tingfólk | 46.374 | 38.152 | 72.218 | 61.662 | 61.604 |

* Uttanríkis- og fíggjarmálartáðharrin í Danmark fáa 128.351 kr. pr. mðr.

| **Samsýning pr. ár:** | Føroyar | Grønland | Ísland | Danmark | Noreg |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgmaður/Stjórnarleiðari | 1.165.044 | 1.130.408 | 1.591.140 | 1.750.241 | 1.298.696 |
| Landsstýrisfólk/Ráðharrar* | 985.800 | 870.524 | 1.437.245 | 1.400.193 | 1.055.064 |
| Tingforfólk | 1.165.044 | 1.130.408 | 1.437.245 | 1.750.241 | 1.298.696 |
| Tingfólk | 556.488 | 457.827 | 866.620 | 739.949 | 739.252 |

* Uttanríkis- og fíggjarmálartáðharrin í Danmark fáa 1.540.212 kr. pr. ár

| **Eftirløn:** | Føroyar | Grønland | Ísland | Danmark | Noreg |
|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsgevari | Framtil 2015 60% av mðr. løn eftir 8 ár í landsstýrinum. Eftir 2015 15% í eftirløn. | 10,0% | 11,5% | Tænastu-mannaeftirløn eftir 8 ár, sum ráharri | 6,03% av løn upp til 842 t.NOK og 24,13% av løn yvir 842 t.NOK |
| Ráðharrar/landsstýrisfólk | | 5,0% | 5,0% | | |

| **Ráðharrabilur:** | Føroyar | Grønland | Ísland | Danmark | Noreg |
|---|---|---|---|---|---|
| | Fáa ikki bil, men hava rætt til koyri-pening. | Bil, uttan førara. Skattað fyri frían bil. | Bil, við førara. Skattað fyri frían bil. | Bil, við førara. Bilurin er skattafríur. | Bil, við førara. Skattafrítt fyri tænastu-koyring |

| **Fráfaringarløn:** | Føroyar | Grønland | Ísland | Danmark | Noreg |
|---|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 3 mðr. løn | 3 mðr. løn | 3 mðr. løn | 6 mðr. løn | 3 mðr. løn |
| Eyka | 6 mðr. løn um lands-stýrisfólk hevur verið í starvið í meira enn 1 ár. | 1 ½ mðr. fyri hvørt ár, tó maks 12 mðr. løn | 6 mðr. løn, um ráðharrin hevur verið í starvið í meira enn 1 ár. | 1/2 mðr. fyri hvønn mðr., sum ráharri hevur verið í starvið, tó maks 36 mðr. løn | 12 mðr løn, tó skal eftir 3 mðr. prógvast at tey aktivt leita eftir arbeiði ella er undir eftir-útbúgving. |